


*Nr. 4* *17. februar 2013* *73. árg.*

# Fruktirnar

*Av fruktum teirra skulu tit kenna teir.* *Matt. 7,16.*

Á okkara døgum verður ikki nógv tosað um góðar gerningar. Vit krúpa uttan um evnið og tosa um okkurt annað. Er ein kristin moralur til? Verður tann spurningurin tikin fram, sæst, hvussu ójøvn fólk eru á mái um tað. Summi siga nei. Evangeliið er orðið um syndanna fyrigeving. Gud er góður móti ótakksomum og óndum. Jú, tað finst ein kristin moralur, sigur onkur annar. Trúgv og lív kunna ikki skiljast sundur. Hvat meinar Jesus, tá ið hann sigur, at eitt og hvørt gott træ, ber góðar fruktir? Hví nevnir hann ***gerningar***, tá ið hann tosar um uppgerðardagin? ”Eg var sjúkur, og tit vitjaðu meg ikki, eg var svangur, og tit góvu mær ikki at eta.” Hví tosar hann um at ***gera*** Guds vilja?

Teir góðu gerningarnir og tann kristni moralurin – tað er eitt trupult evni, men spurningurin er, um vit hava loyvi at skumpa trupulleikan frá okkum. Høvundarnir í okkara tíð eru óførir at avdúka bæði, heimsins vesaldóm, og hvussu máttleys menniskjan er. Treingja vit ikki til eina lívsjáttandi vegleiðing fyri eina ætt, sum ferðast í einum samfelagi, har nógv er lagt í oyði?

”Av fruktum teirra skulu tit kenna teir,” segði Jesus, tá ið hann tosaði um følsku profetarnar. So kunna vit kjakast um, hvat ið hann meinti við „fruktir." Tað átti at verið so sólarklárt fyri ein og hvønn, at tað er eitt samband millum træið, greinarnar og fruktirnar, og júst tað sambandið ber boð um, at trúgvin má vera virksom í kærleika.

Tá ið vit ræðast at tosa um góðar gerningar og kristnan moral, hongur tað óivað saman við, at vit gloyma at rokna við Heilaga Andans gerningi. Paulus sigur, at Gud virkar í okkum at vilja og at virka. Í sama

andadrátti sigur hann, at vit skulu arbeiða upp á frelsu sálanna við ótta og bivan. Tað er ***lívsins*** logikkur, Guds náðar logikkur. Eitt og hvørt gott træ, ber góðar fruktir. Tað er so sólarklárt, og kann ikki afturvísast og setur okkum í gongd.

*Ger tað sindrið, tú kanst,*
*royn av hjarta og sál,*
*gev bert Harranum orku og mátt,*
*og tú veitst, at ei hann nýtir okkara mál,*
*tá ið spurt er um stórt og um smátt.*
*Og hann sjálvur ger alt, og hvat sakar tað tá,*
*um enn taldur tú ert upp í smá?*

*Ger tað sindrið, tú kanst,*
*minst til at tað er so:*
*Gud hjá øllum bert trúskap vil sjá.*
*Glaður ver, um tú bert eini neyðarslig boð,*
*tí hann sjálvur við hjálp er tær hjá.*
*O, tann gleði tann dag, Jesus man siga tær:*
*tað, tú gjørdi, var gjørt móti mær!*

# Hiti kærleikans

*Men ávøkstur andans er kærleiki.* *Gal. 5,22*

Ein gomul søga er um norðanvindin og sunnanvindin, sum veddaðu, hvør kundi fáa ferðamannin at lata seg úr frakkanum.

Fyrst kom norðanvindurin við kulda og avfalli; men maðurin ballaði bara frakkan betur uttan um seg.

So kom sunnanvindurin við mildum hita. Tá gjørdist maðurin ov heitur og mátti lata seg úr frakkanum.

Mest spyrst burtur úr lívinum við hita. Tann, sum kemur nógv saman við øðrum menniskjum, varnast skjótt henda veruleika. Menniskju kunnu vera so stívrend, at harðasta viðferð skalir teimum ikki; men kenna tey kærleikans milda hita, bráðna tey skjótt. Minst til hetta í dag!

Henda kærleika kunnu vit ikki taka frá okkum sjálvum. Av natúru bera vit ikki kærleika í hjarta. Men vit kunnu ganga í skúla hjá honum, sum er Guds kærleiki, Jesus Kristus. Hann er mentur at leggja kærleikans milda hita í hjarta okkara.

Henda er leiðin, vit skulu ganga!

*t.* týddi.

# Ljós í myrkri

*Tó at eg siti í myrkri, lýsir Harrin fyri mær. Mika 7,8.*

Tað er tann, sum hevur verið fyri ósigri, sum sigur hesi troystarríku orðini. Hann er fallin, menn fíggindin kann ikki gleða seg um fallið, tí brátt skal hin falni reisa seg aftur. Men nú situr hann í myrkri – satt er tað – men alt skal laga seg aftur.

Mong menniskju sita í myrkri. Teimum hevur onki gátuført verið fyri, og tey skilja ikki, hví lívið lagaði seg soleiðis. Ella eru tey vilst inn í myrkur og tunglyndi og vita ikki vegin. Tey komu onkursvegna í líðingarskúla og hildu mangan, at tey sótu á botni í sorgarbrunni. Sjúka legðist á tey, og nú sita tey óvirkin í tunglyndismjørka.

Einaferð vóru tey glað kristin fólk, men nú er gleðisvongurin skerdur, og tey finna ikki aftur hitt ljósa, lætta lagið. Tey royna at lesa í Bíbliuni, men har tykist alt so tungt og dapurt. Tey biðja menniskju ráðgeva sær, men ongin haldgóð hjálp er í svørunum, tey fáa.

Hvat skulu tey gera? Tey skulu líta uppeftir. Ikki sita og stara at gátuni og byrðuni og sorgini í sínum egna tunglyndi, men í øllum hesum, sum tey ikki makta, skulu tey lata andlit Guds lýsa fyri sær. Gud er yvir øllum tí dapra og pínufulla. Og myrkari náttin er uttan um tey, bjartari skínur Guds stjørna. Og skulu tey eyðmjúk og vónrík leggja saman hendur og siga: ”Tó at eg siti í myrkri, lýsir Harrin fyri mær!”

*t.* týddi.

# Friður í stríðnum

Tá ið Idi Amin framdi yvirgang í Uganda í 1970-árunum og píndi og drap tey kristnu, mátti kirkjan fara ”undir jørð”. Men tey kristnu bóðu, og at enda hvarv einaræðið.

So kom frælsi, men so rakti stóra Aids farsóttin landið. Fólk doyðu sum flugur av Aids. Men tey kristnu hildu á at biðja og fasta, so at Gud skuldi gera undur. Tey stóðu á orðinum í 2. Krýn. 7,14: ”Og um fólk mítt, sum navn mítt er nevnt yvir, tá bønandi fellur á knæ og søkir ásjón mína og víkur frá vondu vegum sínum, tá vil eg bønhoyra tey á himni og fyrigeva syndir teirra og grøða land teirra.”

Tey fastaðu í 40 dagar; men einki hendi. So fastaðu tey í 40 dagar afturat. Men heldur ikki nú hendi nakað. Men eftir at tey høvdu fastað í tilsamans 160 dagar, fingu tey trúgv uppá, at Jesu blóð grøðir Aids.

Tey bóðu fyri einari konu, sum eitur Rossia, og sum lá at doyggja av Aids. Tá ið læknin hevði kannað hana, vísti blóðroyndin, at hon var grødd fyri Aids. Tá rann hon gjøgnum býin og rópti, at Jesus hevði grøtt

hana fyri Aids. Vitnisburður hennara gjørdi, at Aids-sjúklingar í hópatali komu fyri at verða grøddir. Bara í meinigheitini hjá Grivas Musisi, bispi vórðu yvir 400 grøðingar skjalprógvaðar.

Hetta bar við sær stóra veking, sum hevur broytt Uganda, soleiðis at hetta landið er vorðið lyft upp úr fátækdómi, sjúku og syndarinnar banning. Tí var tað ein stórur íblástur hjá okkum at vitja Musisi bisp og meinigheit hansara í Kampala og sleppa at síggja tey ómetaliga stóru bønamøtini, sum hava broytt Uganda.

Sum Rolf Kjøde í Normisjon segði: ”Vit her í Noregi mangla hetta, sum kirkjan sunnanfyri hevur, nevniliga bøn.” Tí hava vit byrjað eitt bønasentur á Visjon Norge og sett eitt fólk í fulla tíð bara til at biðja, umframt at vit hava føst bønamøti hvønn dag og hvørt fríggjakvøld.

Hetta er svarið upp á tað, sum skal lata okkara eygu upp, so at vit kunnu taka ímóti veking og broyting í Noregi, á sama hátt sum tey upplivdu tað á døgum Hans Nilsen Hauges. Vit skulu hava veking, og vit trúgva, at veking og broyting kemur.

”Visjon Norges Rapport”
*Effie Campbell* umsetti.

---

Hvussu er tað nú, at skrivað stendur í 1. Pæt. 5,7? Kastið nakrar sorgir - tær allar tyngstu - yvir á hann? Nei, skrivað stendur: “Kastið ALLA sorg tykkara á hann; tí at hann hevur umsorgan fyri tykkum.”

*e.c.* ums.

---

Ein kona, sum nýliga var umvend, fór fram til forbøn og bað tey biðja fyri sær, at hon mátti verða loyst frá mannaótta. Tú skalt ikki avrika nakað; men hann, sum er í tær, avrikar alt. Slappa av og sig: Vilt tú brúka meg, so brúka meg, og lat síðani munnin upp. Tú kanst byrja við at siga, at tú hevur givið títt lív til Jesus, so legst meir og meir aftur at tínum vitnisburði.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 17. febr. | Tekstur: 1. Sám. 9,2+15-17+21-23; 10,1+5-10; 11,15; 13,9-14; | bíbliuorð: | 1. Sám. 3,9 |
| 24. febr. | Tekstur: 1. Sám. 16,1-3+6-13+19-23; | bíbliuorð: | 1. Sám. 16,7b |
| 3. mars. | Tekstur: 1. Sám.17,4-11+32-45+48-50a; | bíbliuorð: | Sálm. 37,5 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74